Á, eg veit eitt land. C-dur

```
C                                  G                G7
Á, eg veit eitt land, langt frá jarðarinnar stríð
G7                               C
Við tað vøkru strond, sólin skínur ævigt frí.
C                 C7          F
Á, eg leingist hagar, Jerusalem, til tín,
C                 G        C
Ævigt trygga bústað mín.

        C                               G                G7
        Undurfulla land, á, mær leingist eftir tær,
        G7                          C
        Á tí gyltu strond kærir vinir bíða mær.
        C               C7          F                  Dm (F)
        Mangan eg í andanum hoyri teirra gleim,
        C                   G          C
        Ynskja mær væl komnan heim.
```

2. Nú eg skoði landið so undurfult í trúgv,
Har er jú vár framtíð, har er várt rætta búgv,
Hagar er vár tráan frá sorg og møði her,
Leiðin okkum heimá ber.

Fremmandur eg eri í hesi myrku verð,
Heimstað várt er har, sum vár Harri Jesus er,
Bert ein stokkut stund her við vitnisburði, song,
Síðan hvíldartíðin long.

Jarðarinnar óljóð er ævigt burtur tá,
Í míns faðirs húsi eg hvíluna skal fá.
Ja, eg gangi fram, hóast nógv her forðar mær.
Takk, Gud, skjótt eg eri har. –

Ums. Úr norskum – Líggjas á Váli